VALGREINAR

# Privatisering og frælst vunnulív

**Ingi Olsen**
*Valevni Fólkafloksins í Norðstryemi.*



Tað hevur verið sera hugaligt fyri Fólkafloksfólk at fylgja við nú teir ymisku flokkarnir eru komnir við teirra valskráðum til komandi val.

Í mong ár hevur Fólkaflokkurin sungið um, at vit eiga at byrja eina privatisering av landsins fyritøku. Kendir menn komu úr øðrum londum og skrivaðu álit um júst privatisering. Tað er ikki ov nógv at gerða av, tá sagt verður, at móttøkan av álitinum - sonevnda Caragata álitinum - var sera kaldlig.

Men nú valskráðirnar koma, ein fyri og onnur eftir, sær út til, at vit helst fara at síggja privatiseringar í komandi valskeiði. Tað er tó okkurt "skurr" at hoyra. M.a. verður spurningur settur við, hví vit skulu privatiserað, tá fyritøkurnar kasta so nógv av sær til landskassan.

Eg havi hug til at venda spurininginum so spyrja. Nær skulu vit so selja, um tað ikki er tá tær geva mesta avkasti ? Er prísurin fyri tær ikki júst hin besti tá tað gongur best? Ein kann eisini spyrja, um tað er forsvarligt av landinum at eiga so stóran part av vinnulívinum. Tí hugsa vit okkum tankan, at sera stór afturgong verður í samfelagnum, ja so stendur hitt almenna Føroyar við nærum øllum váanum.

Í ítróttinum verður venjari ofta sera errin, tá aðrir venjarar velja at "kopiera". Heldur enn at gerðast fyrtin, ja so er hann errin, tí hann ofta vil tí ítóttargreinini hann umboðar alt tað besta. Hann veit, at besta úrsliti fæst, um allir gerða sum hann.

Fólkaflokkurin er eisini sera errin av, at aðrir nú halda, at tað sum so leingi hava sagt, kann brúkast av øðrum eisini. Tí vit vita, at tað tænir fólkinum best.

Men lat tað verða sagt til seinast, at eg veit hvønn venjara eg hevði vælt at staðið fyri.

# Sjálvandi ger veljarin einsamallur av, hvat valið skal snúgva seg um

**Jóannes Eidesgaard**



Hóast onkur og ivaleyst fleiri ynskja, at valið bert skal snúgva seg um sjálvstýriskós ella sambandskós, so verður tað í seinasta enda veljarin sjálvir, sum ger hetta av. Kenni eg hann rætt, so raðfestir hann øðrvísi hesaferð. Hann er troyttur av toganini, sum ongan veg førir.

Aftaná samfull seks ár, har stórt sæð øll politisk og rættiliga nógv umsitingarlig orka fyri ikki at tala um pengar hava verið brúkt til fullveldismálið, so vænti eg, at veljarin hesaferð fer at ynskja, at føroyskur politikkur fer at snúgva seg um heilt onnur viðurskifti, nevniliga um fólkið og samfelagið. Og tíbetur hava øll hesi ein møguleika við Javnaðarflokkinum, sum bart út sigur, at nú fara vit til arbeiðis, og nú kann verða nokk við toganin millum loysing og samband - toganini millum Føroyar og Danmark.

Ein slagsíðu er ongantíð góð. Tað gerst óliviligt og óarbeiðsligt umborð, umframt at ein slagsíða er beinleiðis vandamikil. Tí verður altíð miðað eftir at fáa skútuna aftur á rættkjøl. Føroyska skútan hevur nú í seks ár ligið borðfull við einari sórari fullveldisslagsíðu. Men vit mugu ansa okkum, tá vit rætta hana upp aftur, at hon ikki fer slagsíðu á hitt borðið, tí tað gerst tað avgjørt ikki liviligari av. Slagsíða er nú einaferð slagsíða. Um hon er til samband ella fullveldið, so verður hon framvegis ein slagsíða.

Javnaðarflokkurin bjóðar seg fram til at rætta skútuna upp. Vit kunnu fáa hana á rættkjøl.

Sjálvt um vit nógv heldur vilja sleppa at brúka alla okkara orku upp á veruligan politikk, so vilja vit fegin slóða fyri einari endaligari loysn á ríkisrættarligu støðuni, sum fyrst og fremst allir føroyingar kunnu liva við. Hetta gjørdi flokkurin í 1948, tá hann saman við øðrum slóðaði fyri Heimastýrislógini, og hetta kann flokkurin eisini saman við øðrum gera aftur í 2004. Men hetta mál skal so sanniliga ikki sleppa at taka fýra ár. Og loysnin má lynnast frá miðjuni og út til báðar síðir, so hon vinnur undirtøku frá flestu føroyingum. Ríkisrættarligi spurningurin má gerast ein fólksins søk og ikki ein søk fyri einstakar flokkar.

Skútuna á rættkjøl, og so kunnu bæði fullveldisvaktin og sambandsvaktin tørna til við veruligum arbeiði.

# Rúmligari arbeiðsmarknað

**Finnur Helmsdal**
*tjóðveldisflokkurin*



Okkara arbeiðsmarknaður skal bæði effektiviserast og eisini gerast betri kappingarførur, og fáa vit, serliga í hesum døgum, dagliga boð um, hvussu hetta skal gerast. Kappingarføri er ein av grundarsteinunum undir okkara heldur einstáttaða og viðbrekna ídnaði. Tó eigur tað at bera til at gera ein effektivan og kappingarføran arbeiðsmarknað meira rúmligan. Skilt soleiðis, at at arbeiðsmarknaðurin verður rúmligari, tí fleiri fáa møguleikan at hava sína dagligu gongd har. Her verður t.d. hugsað um tey rørslutarnaðu, tey menningartarnaðu og tey sálarsjúku, sum í dag, í alt ov stóran mun, eru á sínum serliga arbeiðsmarknaði. Á vardum verkstøðum ella í vardum størvum. Tað ber til at skipa arbeiðsmarknaðin og leggja alt soleiðis til rættis, at fólk úr nevndu bólkum o.ø. kunnu hava sína dagligu gongd á vanliga arbeiðsmarknaðinum. Tað krevur sjálvsagt serlig tiltøk, uppvenjing og uppfylging. Og tað krevur semju um, hvør skal fyriskipa, og hvør skal fíggja møguligan eykakostnað. Við tíðini fer tað ó ikki at verða trupult hjá nøkrum at síggja eyðsýndu fyrimunirnar av hesum. Bæði fíggjarligar og trivnaðarligar.

# Valið 2004: Eitt nýtt ár, - og val fyri durum!

**Niels Hammer**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*

Hetta er tað íð tjóð okkara hevur fingið lagt í hendur sínar her í byrðjanini av nýggja vælkomna árinum !

Øll stríðast vit um ein kamb, og hvør í sínum lag, fyri rættinum at liva. Fyri frælsi, friði og brøðralag við grannar og arðar tjóðir rundan um okkum og á fjarskotnum leiðum. Alt hetta fyri at tryggja eina haldgóða burðardygga og mennandi framtíð fyri hin einstaka, nærmastu teirra og tjóðina alla.

**Endamàl**

Eg vil virka fyri at rættur og tryggur karmur verður smíðaður um samfelagsvirðir okkara, tey íð hava skapað og mynda tíð og dag okkara nú í øldir. At her á landi skal vera gótt at búðleikast og mennast til eitt hvørt gótt verk, tað veri seg í handaverki á landi og sjógvi, heima og úti.

**Ætlan og framtíð**

Vinnan eins og heilsu og trivnaðarmál eru raðfest fremst í ætlanum og virkisskrá, somuleiðis mentan og átrúnaður. At ein og hvør eigur rættin til at ognast hesi virðir sum eru grundarlag fyri framburið og búðskaparmenningini íð er farin fram tey seinastu mongu árini, ætlandi verandi og komandi ættarliðum at gagnnýta og at føra víðari til framhaldandi útbygging av samfelagi okkara.

Langt er á mál, … men fram kemur hann íð hóliga ferð!

Ì hesum liggur sanniliga goymdur hollur og vitin virkisfýsnið, tí ungu ættini at brúka og í verki at fremja. Ein reiðskapur íð munar so staðiliga. Um tú, íð myndar dagin í dag vaknar og tekur hann í hendur tínar og ferð til verka … tú ert framtíðin.

**Fremstu raðfestingar**

Ásannandi og í bestu samføring míni eru hesi hjartamál … eitt nú heilsu og trivnaðarmál í fremstu raðføring!

Um ikki lagt verður upp fyri heilsufremjandi átøkum kunna vit vera um ein háls áðren vit vita av.

Tí er alneyðugt við konstruktivum og mennandi framtøkum fyri at fyribyrgja heilsuskaðilig árin.

Er skaðin hendur fylgir oftast ein tung, torfør og long leið, íð ger av við hugsjónir og verkætlanir sum lógu fremst í huga og sinni okkara, og sum sindrar umstøður okkara í nærumhvørvinum.

Eg fari at virka fyri … at heilsu og almannaverkið kemur upp á tilætlaða dygdargóða ástøðið sítt!

Soleiðis at verkætlanir íð eru og koma at vera framdar, vera at seta í verk á skynsaman, tryggan og tøknifrøðiligan hátt, samsvarandi nútíðarkrøvum innan heilsu- og røktarviðgerð.

At útbúgvingarmøguleikin innan hesi økir verður útbygdur soleiðis at samfelagið sjálvt kann og skal í mesta mun takað ábyrgd og viðgerða ymisku sjúkrafrøðisligu árinini.

Bert við serkønum og væl útbúgvnum heilsuverkið koma vit á mál. Brúkaranum til heilsubót og frama, soleiðis at hann aftur gerst partur av dagliga virki og framtíðarætlanum samfelagsins.

**Mentan og tjóð**
**Hvat er nú tað ?**

Stutt sagt … mentan og tjóð er mynda og ald av farnum og komandi ættum … men nú av tær!

Hvør enn tú ert, og hvar enn tú búðleikast, so er tað tú sum myndar tilveru og mentunarhugsjónina yvirhøvur. Við tær fylgir lívið, og við tí sum gávu, at liva, virka og nørast undir.

Føroyar er ein rík og hugvekjandi átrúðnaðar og mentunar fremjandi tjóð á kristnum støðið, sum ikki smæðist burtur millum altjóða stóru tjóðirnar. Men skulu vit mennast á hesum økið skulu vit eisini vera fúsin til verka. Nógv liggur á láni og eigur at verða raðfest, til frama og gagn fyri tann íð leitar hesar leiðir í útbúgving og dagliga virki sínum. Her er eisini talan um framkomna tøkni og verkætlanir, undirvísingar-møguleikar og listamiðdepil. Um rætt verður fari fram, kann menningin á hesum økið eisini verða eitt tilfongið til búskapartilgongdina á høgum sernámsfrøðiligum støðið.

Útbúgvingar og fróðskaparfrøðið eru javnan undir níggjari tilvirkan og eiga at raðførðast á jøvnum fóti við tjóðirnar rundan um okkum, eins og skúli, fRískúli, kirkju- og halguskriftfremjandi námsfrøðiligir stovnar og tiltøk eiga at vaksa og mennast.

**Àheitan til valið 2004**

Miðan í politikki og landsfyrisiting yvirhøvur, hevur altíð havt og hevur framvegis týðningarmikla og dygdargóða ávirkan og úrslit at vísa á, bæði í umsiting og leiðslu, og fremur harvið trygd og trivna fyri tí einstaka.

Tí ferð atkvøða tín væl um tú setur kross tín við Miðflokkin.

Eg fari hervið at heita á teg um at seta kross tín við lista H !

Eitt gott nýggjár og gottt val Føroya fólk.



VALGREINAR

# Føroyar fyri øll – eisini samkynd

**Eg ivist onga løtu í, at eg eri kristin. Samstundis haldi eg ikki, at politikkur og átrúnaður skulu teingjast ov tætt saman. Í mínum hugaheimi snýr politikkur seg um at skapa eitt samfelag, har allir borgarar hava somu lógartryggjaðu borgararættindi. Hesar lógir skulu kortini ikki kroystast niður yvir kirkjur og samkomur.**

**John Johannessen**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*
*john@jokarin.com*



Tað góða samfelagið, er Føroyar fyri øll. Eitt samfelag, har allir borgarar, óansæð átrúnað, sosialan status og kynsliga sannføring, skulu hava somu borgararættindi.

At fáa virðilig viðurskifti fyri samkynd í Føroyum, er ein spurningurin um borgararættindi. Tað er ikki ein spurningur um átrúnað.

Tá fólk velja at liva lívið saman, eiga tey at hava møguleika at tryggja fíggjarligu- og arvaligu rættindini fyri hvørjum øðrum. Hendan møguleikan hava samkynd ikki í Føroyum í dag. Og skulu vit kalla Føroyar tað góða samfelagið fyri øll, er neyðugt, at samkynd fáa hendan møguleikan. Møguleikan at tryggja seg, soleiðis at tey hava fíggjarlig og arvalig rættindi hvør fyri øðrum.

Tað er ikki rímiligt at Føroyar, sum ein partur av altjóða samfelagnum, noyðir hesi fólkini at flyta av landinum, sum kynsligar flóttar. Tá tosa vit ikki um tað góða samfelagið fyri øll.

**Testamenti ikki nóg mikið**

Borgarrarættindini at tryggja fíggjarligu- og arvaligu rættindini hjá tveimum av sama kyni, sum liva saman, kunnu ikki tryggjast við einum testameti, sum onkur kanska heldur. Eitt testamenti kann til dømis ikki geva hinum partinum loyvi at arva útgjaldið úr einari pensjónsskipan, um hin parturin letur lív.

Tí er tað eisini rætt at loyva øðrum fólkum, sum liva sítt lív uttan maka, men velja at gera tað undir somu lon, møguleikan at fáa full arvarættindini, hvør fyri øðrum.

**Ikki noyða kirkjuna**

Spurningurin um hesi rættindi er also ein spurningur um borgararættindi. Nøkur praktisk viðurskifti, sum gera lívið greiðari. Tí haldi eg tað vera rætt at finna eina virðiliga loysn fyri samkynd í Føroyum.

Men tá tað kemur til spurningin, um eitt slíkt parlag, skal vælsignast av presti ella øðrum samkomuleiðara, er talan um eitt annað mál. Eitt mál, sum politikararnir skulu halda seg burtur frá.

Vit eiga at halda politikkin burtur frá átrúnaðinum og lata kirkjur og aðrar samkomur sjálvar gera av, hvørja støðu tær taka í hesum máli.

# Løgtingsvalið 2004

**Frithleif Olsen**
*valevnið Sambandsfloksins í Eysturoy.*



Í nýskipanaruppskoti Sambandsfloksins, verða Føroyar roknaðar sum partur av einum ríki, ið er samansett av trimum javntstillaðum londum.

Fyri at kunna vera í einum ríkisfelagsskapi er neyðugt, at nøkur málsøki eru felags fyri alt ríkið. Hesi eru:

Kongshúsið, Grundlógin, Uttanríkismál, Verjumál, Gjaldoyra og Rættarskipanin.

Hesi felags málsøki eru ramman um ríkið. Afturat hesum, eru onnur málsøki, sum í dag eru felagsmál, men sum heimastýrið skal hava møguleika til at yvirtaka.

Tað skal tó ikki kunna bera til at yvirtaka hesi málsøki, uttan so, at gjaldskylda eisini fylgir við yvirtøkuni.

Mín áheitan til politikararnar er at halda uppat at niðurgera ta skipan, sum hevur verið karmurin um okkara vælferðarsamfelag fram til dagin í dag, og sum vit øll hava notið gott av.

Ein niðurskurður uppá útvið 400 milliónir krónur um árið, skaðar sjálvandi vælferðarsamfelagið Føroyar.

Komandi Løgtingsval verður ein fólkaatkvøða, um loysing frá Danmark við ótryggum umstøðum, ella samband við Danmark við tryggari umstøðum. Tí vil eg heita á allar veljarar, um at hava hetta við í støðutakanini 20. januar. Einasta trygd fyri at verja vælferðina, er at velja ein sterkan Sambandsflokk valdagin.

Eg vil takka fyri, at tað er víst mær tað álit, at koma uppá sambandslistan til komandi Løgtingsval. Um eg komi inn á ting, fari eg at gera alt fyri, at land og fólk varveitir vælferðina, hjá okkara stoltu tjóð.

# Rentustuðul til sethúsabygging varðveitast

**Jan Poulsen**
*valevni fyri Javnaðarflokkin í Suðurstreymi.*



Rentustuðulin til sethúsabygging skal varðveitast, tað kann ikki rokkast við tað.

Hetta siga vit í Javn-aðarflokkinum í okkara valskrá.

Fráfarandi samgonga ætlaði at niðurskivað rentustuðulin til 0, men tíbetur fyri núverandi og komandi sethúsaeigarar, slitnaði samgongan og nýval var útskrivað.

Tað er ein sannroynd, at rentustuðulin hjá nógvum familjum, júst er tann peningaligi marginalurin sum heldur lív í familjuni. Missa tey hann, hoykna tey undan, og mugu fara frá húsi og heimi.

Skal tað verða lív lagað hjá fólki, sum hava sett og fara at seta búgv her á landi, má og skal rentustuðulin varðveitast í verandi líki.

Tað er av alstórum týdningi, at vit ikki missa burturav okkara raska produktiva fólki sum her búleikast á klettunum, av tí at tey verða noydd at flyta til onnur lond at búleikast, tí tey ikki hava ráð at liva her. Tey eru ein fortreyt fyri, at vit hava eitt væl virkandi/framleiðandi samfelag, sum ger at vit kunnu kappast við onnur lond á so nógvum økjum sum møguligt.

Javnaðarflokkurin er trygdin fyri at rentustuðulin verður varðveittur soleiðis at núverandi sethúsaeigarar, hava ráð at sita í húsum teirra og komandi sethúsaeigarar kunnu seta búgv, og kunnu búleikast her á landi.

Vel javnaðarflokkin. Gott val.

# Okkara størsta skylda: tey, sum bera brek

**Jógvan á Lakjuni**
*tingmaður og valevni Fólkafloksins í Eysturoy*



Øll vit, sum eiga børn, hugsa sjálvandi um tey og stúra kanska mangan og spyrja, hvat skal verða av teimum. Men tá ið børnini eru fullfør, so vita vit, at allir møguleikar liggja opnir fyri teimum, og at tey nokk skulu fara at klára seg.

Men tá ið vit so hugsa um hetta at eiga eitt barn, sum ikki er ment at klára seg sjálvt, so er tað so ómetaliga eymt - henda hugsanin: hvat skal verða av barninum, tá ið tað veksur til, og eg ikki longur fái hjálpt tí? Eg trúgvi, at tað er trupult hjá teimum, sum ikki hava upplivað hesa støðuna, at seta seg inn í hana.

Tá ið eg taki hetta fram her, so er tað fyri at vísa á, hvussu týdningarmikið tað er, at vit sum politikarar hava fyri eyga, at vit her hava eina av okkara størstu skyldum: at taka okkum av okkara veikastu borgarum og hjálpa foreldrunum, sum ofta sita so einsamøll við trupulleikunum!

Tíbetur eru batar hendir tey seinastu árini, men langt er eftir á mál.

Fólkaflokkurin vil framhaldandi arbeiða fyri at gera umstøðurnar hjá menningartarnaðum, rørslutarnaðum og øðrum, sum bera brek, betri, so tey kunnu liva eitt virðiligt lív - eisini tá ið tey vaksa til og eldast.

Tað skylda vit teimum!

# Varðveita kristni í skúlunum

**Jóanis Nielsen**
*Valevni fyri fólkaflokkin í Vágum*



Flestu lond kring okkum eru komin í knípu av innflytarum, ikki minst av teirra krøvum um átrúnaðarligan rætt til undirvísing í teirra religión á hædd við kristindómsundirvísing. Í okkara fólkaræðsliga parti av heiminum, hava vit trúarfrælsi, men eigur hetta ikki at vera fyri ein og hvønn prís, soleiðis at skilja, at okkara forni kristni arvur má víkja fyri islam og øðrum átrúnaði. Almenna fatanin av okkara guðstrúgv, er ein partur av tí føroyska arvinum, og er ein rættur, sum ikki skal kunna avvísast frá skúlum okkara, við hjálp av lógini.

**Forboð ímóti bøn í skúlunum.**

Amerikanski hægstirættur setti í 1962 forboð ímóti bøn í skúlunum, út frá princippinum um, at kirkja og statur skuldu heilt skiljast at. Orsøkin til forboðið annars var støða ateistanna, teir trýstu á at fáa hetta avtikið. Síðani hava fleiri ferðir verið uppskot frammi um at føra inn aftur morgunbøn í skúlarnar, men tey eru hvørja ferð vrakaði av kongressini, hóast stórur partur av amerikanarum ganga inn fyri morgunbøn í skúlunum.

Hetta vísir, at verður givið eftir, so kann tað ikk upprættast aftur. Í amerikanska førinum vóru tað ateistar, sum trýstu, hjá okkum kann tað í framtíðini verða fremmandir ágangandi átrúnaðir, um vit ikki eru á varðhaldi fyri innflytarum.

**Okkara lógir skulu virðast.**

Vit virða rættin hjá øllum londum og menniskjum at hava teirra mentan og átrúna, og vit eiga at laga okkum eftir teimum lógum og siðum, sum eru í teimum londum vit vitja, eins og vit halda tað vera rættast, at vit hjálpa á staðnum, heldur enn, at fylla okkara land við innflytarum, og tí krevja vit eisini, og tað má vera minsta krav, at um fólk við øðrum átrúnað búseta seg í okkara landi, so mugu tey eisini integrera seg í okkara landi, so mugu tey virða tær lógir, sum eru galdandi her, og viðurkenna sjálvræðisrættin í landi okkara.

**Yvirtaka útlendingamál fyri at fyribyrgja trupuleikum.**

*Eingin má sleppa at taka kristindómsundirvísingina úr skúlanum og seta religiónsundirvísing í staðin, tí tað seinna er eitt sera vítt hugtak. Í Danmark og øðrum ES-londum, verður ikki leingi inntil kristni bert verður ein partur av aðrari átrúnalæru í skúlunum og ikki eitt serstakt fak. Hartil mugu vit ikki koma, tí tá hava vit vrakað fedranna arv, sum hevur verið til signing fyri okkara land gjøgnum øldir.*